# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# Nýggjur i30 frá Hyundai



Hyundai i30 er tann mest týðandi Hyundai, sum nakrantíð er komin til Evropa

**Hyundai koma nú á marknaðin við i30, ið er ein heilt nýggjur bilur, sum er teknaður og konstrueraður í Evropa. Hann verður gjørdur í Suðurkorea, men frá 2009 skulu teir eisini framleiðast í Kekkia**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hóast fleiri nýggir Hyundai eru komnir á evropeiska marknaðin seinastu árini og fleiri eru á veg, roknar Hyundai leiðslan i30 sum tann mest týðandi bilin, teir nakrantíð hava gjørt og vænta sær nógv honum.

Hyundai i30 er og Kia Cee'd, sum kom á marknaðin fyrr í ár, eru tvær síður av somu søk. Plattformar og motorar eru so gott sum teir somu, hóast teir eru ymsikir á øðrum økjum. Stórur dentur er lagdur á komfort og góðar koyrieginleikar.

Hyundai i30 fæst við trimum bensin og tveimum dieselmotorum. Bensinmotorarnir eru 1.4 litra við 109 hk, 1.6 litra við 122 hk og 2.0 litra við 143 hk. Dieselmotorarnir eru báðir 1.6 CRDi við ávikavist 90 hk og 115 hk. Seinni kemur eisini ein 2.0 diesel. 1.6 og 2.0 benzinútgávurnar fáast við automatiskum girum.

Talan er um ein rúmligan og væl innrættaðan 5-persónabil. Viðførisrúmið er 340 litrar og kann víðkast til 1250 litrar við at leggja baksetrini niður.

Hyundai og dótturfelagið Kia eru kend fyri at gera álítandi bilar, sum fáa góðan karakter fyri kvalitet. Hyundai i30 er teknaður og konstrueraður í Evropa, og frá 2009 skulu teir eisini framleiðast í Kekkia, á sama hátt sum Kia Cee'd verður framleiddur í Slovakia.



*i30 er ein hatchaback við fimm hurðum og góðum plássi til fimm ferðandi*



*Hyundai i30 innan. Flott design í góðum kvaliteti*

## Fimm stjørnur til Fiat 500



*Fiat 500 fekk fimm stjørnur frá EuroNCAP fyri at verja tey ferðandi í bilinum*

Nýggi minibilurin Fiat 500, sum varð presenteraður í Torino 4. juli 2007, júst 50 ár eftir at forgangarin eisini varð presenteraður á sama stað í 1957, fekk fimm stjørnur, eftir at bilurin hevði gjøgnumført EuroNCAP krasjtestirnar. Sagt verður frá EuroNCAP, at tað er flott fyri ein bil í miniklassanum at fáa fult stigatal fyri at verja tey ferðandi í bilinum.

# Týskarar ákæra kinesiska bilaídnaðin

Stóru týske bilaframleiðararnir BMW og Mercedes-Benz ákæra kinesiska bilaídnaðin fyri at kopiera sínar bilar, so teir líkast so nógv, at fólk næstan ikki kenna mun á teimum, sum teir t.d. hava gjørt við BMW X5 og tann lítla Smart.

Týski samveldiskanslarin Angela Merkel hevur á vitjan í Kina gjørt vart við trupulleikan.

**mg**



*Kinesiski CEO SUV frá kinesisku verksmiðjuni Shuanghuan Automobile er eitt kopi av BMW X5*